# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit hava eisini havt yvirvág móti EB/Streymi, so hví ikki eisini hesaferð*

*Bartal Eliasen, ÍF*

# Sunnudagurin er bjargaður í Fuglafirði

**Í bjargingarroyndini misti KÍ takið á B36, meðan EB/Streymur enn eina ferð hevði stórar trupulleikar av fuglfirðingum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fuglfirðingar draga andan nakað lættari nú. Sigurin við Margáir ger eftir øllum at døma, at talan eisini verður um sunnudagsfótbólt í Fuglafirði komandi kappingarár*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Fótbóltur er eitt undarligt spæl. Ferð eftir ferð vísir tað seg, at eitt lið hevur ógvuliga gott tað á einum øðrum og vinnur sigur oman á sigur, og so vendir tað brádliga. Dømini um hetta eru so mong.

Feskasta dømið úr Formula deildini eru uppgerðirnar millum NSÍ og Víking. Gyltu gullárini í Gøtu vóru gøtumenn omaná. Síðani hevur NSÍ í nógv ár verið greitt omaná í grannauppgerðunum, men nú er tað aftursnarað 180 stig. Sunnudagin var triðja uppgerðin millum leirvíkingar og gøtumenn øðru megin og teir í Runavík í ár. Í 4. umfari vann Víkingur 1-0 á heimavølli. Í 14. umfari vann Víkingur 3-1 í Runavík, eftir at heimaliðið hevði verið frammanfyri, og sunnudagin endaði Víkingur aftur omaná, eftir at NSÍ hevði verið á odda.

Harvið hava meistararnir mist nígggju stig ímóti Víkingi í ár. Um tað hevði havt verið sum undanfarin ár, og NSÍ hevði fingið fult í grannauppgerðunum, so hevði NSÍ ikki havt 37, men 46 stig, og so hevði møguleikin framvegis verið fínur fyri at endurvunnið FM heitið.

Møguleikin er ikki púra burtur. Tað eru tíggju stig frá NSÍ og fram til EB/Streym, og tað eru fimtan stig eftir at spæla um.

Uppgerðirnar millum EB/Streym og ÍF eru annað dømi um, at tað ber til hjá liði, sum er væl lægri á støðutalvuni enn mótstøðuliðið, at spæla eitt orduligt puss. Í 7. umfari vann EB/Streymur tepran 3-2 heimasigur á ÍF, sum var óheppið ikki at fáa stig við sær til hús. Í 14. umfari vitjaði oddaliðið í Fuglafirði, og ta ferðina vann heimaliðið tryggan 2-0 sigur. Í gjárkvøldið vitjaði ÍF við Margáir, og aftur hesa ferðina spældu fuglfirðingar oddaliðnum eitt orduligt puss.

Fulla úrtøkan í Streymnesi í gjárkvøldið ber eftir øllum at døma við sær, at tað eisini næsta ár verður sunnudagsfótbóltur í Fuglafirði.

Higartil í ár hevur KÍ havt gott tak á B36. Í 7. umfari varð B36 sent úr Klaksvík við 2-1 tapi, og í 14. umfari vann KÍ 2-0 á heimavølli ímóti B36. Sunnudagin vann B36 1-0 á heimavølli ímóti KÍ. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað kiksaði í fyrstu royndini, sum hevur eydnast fyrr í ár, eftir at teir í Klaksvík hava skift venjara og eru farnir undir bjargingarroyndina.

Hetta var ney van lyklaupp-gávan hjá nýggja venjaranum, sum hevur sagt, at talan fór at verða um seks finalur. Tann næsta verður á skránni sunnudagin, og tá er av sonnum talan um finalu. B71 legði við 1-0 heimasigri á illa sperda Skála seg upp á síðuna av klaksvíkingum. Sunnudagin hittast KÍ og B71 í Klaksvík. Fyrr í ár hevur KÍ vunnið 2-1 á heimavølli á B71, sum vann 2-0, tá ið KÍ vitjaði.

B68 sendi HB til hús við ongum. Harvið er møguleiki fyri, at HB kann enda bæði á 2. og 5. plássi. B68 er framvegis liðið, sum – í mun til tað, sum tað varð roknað við - hevur staðið seg best av øllum. Um gongdin heldur fram, so er møguleikin ikki heilt burtur fyri, at toftamenn kunnu lyfta seg upp um miðstrikuna.

23. umfar sær soleiðis út: EB/Streymur-Víkingur, Skála-B68, NSÍ-B36, HB-ÍF og KÍ-B71. Botnuppgerðin í Klaksvík kann verða eykað krydrað, um óvæntað úrslit stinga seg upp. Eitt nú, tá ið toftamenn fara at vitja illa sperda Skála. Um Víkingur fer at gera ein orduligan vørr í Streymnesi, so er spurningurin, um fyrsta FM heitið verður fingið til høldar í Sundalagnum á mikkjalsmessu, sum vit fyri nøkrum vikum síðani spáddu. Men nú fáa vit at síggja, tí fótbóltur vísir seg aftur og aftur at vera eitt undarligt spæl!

# Tór-Ingar vil hava gegnigar dómarar

**Tór Ingar Akselsen, sum spælir við 07 Vestri, heldur, at rættast er, at dómarar, sum ikki hava landafrøðisligt tilknýtið til AB, VB/Sumba og 07 Vestur døma seinastu dystirnar hjá oddaliðunum í 1. deild**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Spenningurin er stórur millum tey trý oddaliðini í næstbestu fótbóltsdeildini, VB/Sumba, AB og 07 Vestur. Nú fimm umfør eru eftir at spæla, er VB/Sumba á odda við 53 stigum, AB er nummar tvey við 52 stigum, og 07Vestur er nummar trý við 50 stigum. Tvey lið flyta upp í lovaða landið, Formuladeildina, og eitt av hesum trimum liðunum stendur eftir við svartaperi.

Í næsta umfarinum tekur VB/Sumba ímóti AB, og í 25. Umfari skal 07Vestur suður til Vágs. Nógvir spenningur er í hesum dystunum og í øðrum dystum, sum oddaliðini spæla. Farna vikuskiftið tapti 07Vestur 1-2 á Tvøroyri ímóti TB. Dómaraveteranurin, Birgir Sondum dømdi dystin, og tað hevur Tór-Ingar Akselsen frá 07 Vestri ongar trupulleikar við.

- Tað varð í ordan, at Birgir Sondum dømdi dystin, men vit eru sera harmir um, at báðir hjálpardómarnir vóru úr Suðuroy, sigur Tór-Ingar Akselsen

Serliga er tað ein støða í dystinum, har Tór-Ingar metir, at 07 Vestur átti eitt brotsspark, sum kundi givið teimum eitt- kanska avgerandi - stig. Í sendingini "3. Hálvleikur" hjá Rás2 sunnukvøldið bar Tór-Ingar uppá mál, at tað hevði verið hóskandi og best, at dómarar frá Eysturoynni og Norðoyggjum høvdu dømt teir seinastu fimm dystirnar hjá ávikavist AB, VB/Sumba og 07Vestri.

Tór-Ingar heldur, at tað hevði verið best, at ein tryggjaði sær, at eingin dómari er ógegnigur í oddastríðnum í 1. deild. Og er tað best tryggjað við, at dómarnir eru frá landafrøðisligu økjunum, sum ikki hava tilknýtið til AB, VB/Sumba og 07Vestur. Mánamorgun varð næstformaðurin hjá Argja Bóltfelag, Andrass Drangastein gestur í morgunsendingini hjá Rás2. Har segði Andrass Drangastein, at hann stuðlar sjónarmiðunum hjá Tór-Ingari Akselsen, at eingin ivi má verða, so ein er tryggjaður ímóti illgrunum og illstøðum í tí harða oddastríðnum, sum er fyri framman í 1. deild. Og tískil er Andrass fult samdur við Tór-Ingari.

## Øll mugu gera sítt

Lassin Isaksen, dómaraleiðari hjá Fótbóltsambandi Føroya sigur í stuttari viðmerking, at hann hevur bert 50 dómarar og hjálpardómarar at rutta við til dystirnar í Formuladeildini, 1. deild, 2. deild, unglingadeildini og 1. deild kvinnum.

- Tað er torført at fáa kabalina at ganga upp við bert 50 fólkum, men arbeitt verður út frá bestu sannføring, tá dystirnir skulu mannast við dómarum, sigur Lassin Isaksen.

Lassin Isaksen leggur dent á, at tað hevði hjálpt væl, um øll feløgini gjørdu sítt til at manna dómarahópin í Føroyum, men tíverri eru tað summi øki - eisini tey, sum finnast at - sum ikki útvega nakran dómara. Lassin fer at gera sítt besta at manna dystirnar hjá VB/Sumba, AB og 07Vestri við góðum dómarum, men kann orsaka av tí knappa talinum av dómarum í Føroyum, ikki garantera, at dómarnir til dystirnar hjá VB/Sumba, AB og 07 Vestri verða úr Eysturoynni og Norðoyggjum. Men um øll økini í framtíðini spýta í dómarakassan, so verður tað sjálvsagt lættari at fáa landafrøðisligu rættvísuna at ganga upp.